# Platform verður kongaligt

**Platform fer fyrst í komandi ári í søguna. 15. januar letur dansistaðið REX upp í hølunum, har Platform hevur húsast seinastu árini**

DANSISTØÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Krunkasvart. Kongamyndir. Nýggir møblar. Gelendari. Barr úr messing.

Dansistaðið í høvuðsstaðnum, Platform, skiftir fullkomiliga ham fyrst í komandi ári. 1. januar letur dansistaðið aftur í fjúrtan dagar, og tá hurðarnar lata uppaftur15.januar er navnið Platform søga, og trúgvu viðskiftafólkini skulu venja seg við grikska navnið, REX, sum merkir kongur.

– Orsøkin til, at vit hava valt at skifta ham er fyri at fáa eina størri gjógv millum viðskiftafólkini, sum ganga á Platform og Eclipse. Hóast talan er um sama virki, eru Platform og Eclipse framvegis størstu kappingarneytar hjá hvørjum øðrum, og við endurnýggjanini royna vit at fáa størri mun millum viðskiftafólkini, sum ganga á Platform og Eclipse, greiðir Havgrímur Johannessen frá.

Higartil hevur aldursmarkið á Platform verið 20 ár. Tá REX letur upp 15. januar verður aldursmarkið 25 ár.

### Mentanin sleppur framat

Havgrímur Johannesen greiðir frá, at ætlanin er at heitið á dansistaðnum leygarkvøld verður REX Night Club, meðan hinir dagarnir í vikuni skal dansistaðið eita REX Culture Club.

– Vit ætla, at nýggja staðið skal verða mentanarhúsið í høvuðsstaðnum. Fyriuttan leygarkvøld skal mentanin í nógv størri mun fáa innivist hjá okkum. Ætlanin er at skipa fyri jazz-, blues- og dramakvøldum á nýggja staðnum, og sjónleikur sleppur eisini framat, fortelur Havgrímur Johannessen.

### Toni er burtur

Tað eru góð tvey árin síðan at Eclipse, Platform og Café Natúr vóru løgd saman. Síðan hava Toni Dam, Petur Olsen og Havgrímur Johannessen átt støðini í felag, men fyri tveimum mánaðum síðan takkaði Toni Dam fyri seg, og tískil standa Petur Olsen og Havgrímur Johannesen nú einsamallir á odda fyri Eclipse, Platform og Café Natúr.




*Gamli Platformurin takkar fyri seg 15. januar og REX verður nýggja heitið á dansistaðnum, har Platform helt til*

## Viðvíkjandi nýggjársbálum

Fyri best møguligt at fyribyrgja eldsbrunum nýggjársaftan, hevur brunaumsjónin sent okkum góð ráð um, hvussu farast skal fram, tá ið bál skulu kyndast

Bálini verða ofta kynd ímillum hús, og tí er alneyðugt at tað verður ansað væl eftir, og at fólk hugsa seg væl um, áðrenn tey festa í.

Øllum kunnugt er tað ikki heilt vandaleyst at brenna bál, men niðanfyri eru nakrar reglur frá brunaumsjónini, sum bøta um tryggleikan í sambandi við bálini, um tær verða fylgdar.

Vónandi taka fólk hetta til eftirtektar.

Brunaumsjónin vísir á, at sambært § 27. stk. 1. í brunalógini er revsivert at brenna bál á støðum, sum seta fólk, ognir og lutir í vanda.

Nýggjársbál millum hús skulu tí handfarast við hesum fyri eyga.

**1.**
Er vindur ella koma kvirlublak skal ansast eftir, at ikki glóðir fúka kring um í grannalagnum.

**2.**
Umstøður og sløkkiamboð skulu vera til staðar at sløkkja bálið við, um tað gerst neyðugt.

**3.**
Ein dungi at brenna skal ikki vera størri enn 3 m í tvørmál í neðra og 2 m høgur.

**4.**
Er talan um nógv tilfar at brenna, skal alt ikki berast á bálið í einum, men leggjast skal afturat so hvørt.

**5.**
Í minsta lagi 20 m skal vera millum bál og hús. Undan lotinum skal vera í minsta lagi 40 m millum bál og hús.

**6.**
Eru ikki nóg stórir fráleikar, skal bálið gerast tilsvarandi minni, soleiðis at tað ikki elvir til ampa ella vanda fyri nakran.

**7.**
Treytirnar frá kommunala sløkkiliðinum skulu haldast, millum annað skal kannast um lýkindi eru at brenna bál.

**eys**





Gott nýggjár góðu kundar!

PRÍSLÆKKING

av uttanlandstakstunum frá 1. januar 2005

Allir uttanlandstakstirnir eru dagførdir, soleiðis at kundar okkara fáa teir bestu prísirnar á marknaðinum.

1. januar 2005 lækka vit flest allar uttanlandstakstirnar - til fastnetið, GSM og fylgisveinar.

Á **www.tele.fo** síggjast nýggju prísirnir.

FØROYATELE